Ringt hjá ungum at fáa arbeiði

— sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag, Karl Johansen, í samrøðu við Tíðindablaðið Sosialin

— Hvussu er støðan á arbeiðsmarknaðinum í ár í mun til í fjør?

— Í januar og februar merktu vit eitt vist arbeiðsloysi millum menn, sum vildu vera í arbeiði. Tá fingu vit fleiri fyrispurningar frá monnum. Og hesa somu tíðina var lítið arbeiði á Baccalao — bara helvtin av tí vanliga.

— Er so einki arbeiðsloysi í løtuni?

— Eg sigi ikki, at tað einki er. Tað finst altið eitt vist arbeiðsloysi, men haldi ikki, at tað er nakað arbeiðsloysi millum menn, sum plaga at hava arbeiði.

— Hvi veit eg ikki. Men kanska tað er tað, at tey ungu ofta ganga í skúla, til tey eru 17, 18 og 19 ár og hava ongantíð arbeitt. Tað visir seg fyri mær, at arbeiðsgevarar ikki eru serliga glaðir at taka ungar dreingir, sum ongantíð hava roynt at hava arbeiði.

Hækkingarnar hvørva í tolli beinanvegin

— Í fjør hækkaði tímalønin við 1,25 kr. og í ár hækkar hon við 1,21 kr. Er virðið minkað í mun til prísgongdina annars

— Virðið er í hvussu er ikki vaksið.

— Kann hugsast, at tit so fara at seta størri lønarkrøv næsta ár?

— Spurningurin er, um tað loysir seg at seta nøkur lønarkrøv. Hækkingarnar verða etnar skjótari upp, enn vit fáa lønina. Hvørja einastu ferð lønin hækkar, fer hon avstað aftur í tolli og skatti. Hetta kunnu vit ikki góðtaka.

Lívstrygging

— Á seinasta aðalfundi samtykti Havnar Arbeiðsmannafelag at tekna eina lívstrygging?

— Tað var soleiðis, at felagið rindaði 10 kr. av limagjaldinum til eina lívstrygging. Henda gav í dag 3.500 kr. til eftirsitandi einkjuna. Vit mettu, at hetta var ikki til rættuliga stóra nyttu. Tí kallaði nevndin ein tryggingarmann til ein fund, tí vit vildu antin gevast ella fáa eina líkinda trygging.

— Vit kundu fáa eina trygging upp á 100.000 kr. fyri 250 kr. um árið. Hækkaðu vit limagjaldið við 100 krónum og lótu tær fara beinleiðis í eina trygging, og felagið tók hinar 150 kr. fyri limin gjøgnum eitt-prosents-gjaldið, hildu vit tað vera eina forsvarliga trygging.

— Hesa ætlan løgdu vit fyri aðalfundin. Aðalfundurin samtykti uppskotið við stórum meiriluta.

Eftirlønartrygging

— Hevur arbeiðsmannafelagið nakrantíð hugsað um at stovna eina arbeiðsloysistrygging?

— Tað hava vit ikki, men felagið hevur álagt nevndini at kanna møguleikarnar fyri at skipa eina eftirlønartrygging. Tankin er hann, at tá ein arbeiðsmaður heldur upp at at arbeiða 67 ára gamal og fær fólkapensión, skal hann kunna fáa eitt ískoyti frá arbeiðsmannafelagnum. Men fyri at fáa eina slíka eftirlønartrygging, mugu vit helst hækka prosentgjaldið, og vit halda eisini, at arbeiðsgevarin skal rinda ein part av tryggingini.

— Vit hava tosað um arbeiðsloysistrygging, men málið hevur ongantíð verið so aktuelt, at vit hava lagt eitt ynski um eina slíka fyri tingið. Men verður tað soleiðis, at arbeiðsloysið fer at halda á, fara vit at krevja eina arbeiðsloysistrygging.

Sáttmálin verður hildin

— Tá arbeiðsloysi er, kann henda, at lønin verður trýst niður. Hvussu verður sáttmálin annars hildin?

— Vit hava ikki hoyrt nakað um lønartrýst. Hjá summum arbeiðsgevarum knípur tað við organisatiónsspurningum. Í sáttmálanum stendur, at arbeiðsgevarar skulu bert taka limir hjá okkum til arbeiðis. So skal maðurin sjálvandi vísa eitt loyviskort — at hann er limur og at hann ikki skyldar. Hetta fara nógvir lætt um. Men aðrir ansa ógvuliga væl eftir.



Karl Johansen: — Lønarhækkingin fer hvørja ferð avstað aftur í tolli og skatti

— Í fjør fingu tit eina uppsagnarfreist. Verður hon hildin?

— Eg veit bert um eitt dømi, tá uppsagnarfreistin ikki er hildin. Tá vit vendu okkum til arbeiðsgevaran, sum ikki vísti av hesum, tók hann mannin aftur í arbeiði.

— Hvussu gongst við álitismannaskipanini?

— Ikki av tí allarbesta. Ofta vara arbeiðsplássini stutt. Tá álitsmaður er valdur, er arbeiðið kanska longu liðugt. Men á teimum stóru arbeiðsplássunum finst skipanin.

— Er torført at fáa menn at taka starvi sum álitismaður upp á seg?

— Tað visir seg, sum eingin vil vera álitismaður.

— Er hann ov illa vardur?

— Møguliga er hann ikki nóg væl vardur, men ofta hevur álitismaður líka nógvar trupulleikar av sínum egnu, tí teir ganga á hann í tíð og úrtíð — ofta um ting, sum einki hava upp á seg. Hetta møðir mannin og hann tímir ikki og sigur seg frá, sigur Karl Johansen.

1. mai — fyri friði og arbeiði

Ikki er alt av tí ónda, ið komið er úr Amerika. Upprunin til 1. mai-haldið er nevniliga at finna innan tað amerikanska fakfelagið American Federation of Labor, við tað, at teir árið 1888 samtyktu, at 1. mai 1890 skuldu seta fram kravið um 8 tímar arbeiðsdag. Málið kom eisini fyri á fyrstu stevnuni hjá 2. Internationala árið 1889, og úrslitið varð, at 1. mai 1890 kom at verða fyrsti altjóða arbeiðarasolidaritetsdagurin, og allastaðni varð kravið um 8 tímar arbeiðsdag sett fram. Eitt tílíkt krav vildu myndugleikarnir ikki uttan viðari góðtaka og fórdi hetta í fleiri førum til blóðigar samanbrestir, har myndugleikarnir sendu løgreglurna eftir kravgongufólkunum.

Arbeiðaradagurin hevur síðan verið hildin á hvørjum ári um stórar partar av heiminum. Í nógvum londum varð og er dagurin bannaður, tí tey unna ikki arbeiðarunum teirra rættindi. Eisini hevur dagurin verið og verður misnýttur av summum stýrisløgum, t.d. kann nevnast, at nazistarnir í 1933 í Týskalandi hildu dagin sum ein klassasamarbeiðsdag alt meðan politiskir og fakligir leiðarir antin vóru avrættaðir ella sótu í konsentratiónslegum. Í Eystureuropa er dagurin ikki at rokna sum ein arbeiðaradagur heldur, við tað, at stýrini har misnýta dagin og brúka hann sum tjóðskaparligan hernaðarframsýningardag.

Friður og arbeiði

1. mai 1982 hevur arbeiðararørslan í norrønu londunum valt sær sama heiti og krav til dagin: Friður og arbeiði.

Arbeiðararørslan í norrønu londunum vil við hesum heiti og kravi vísa sína andstygd yvir fyri dubbingarpolitikkin hjá stórveldunum, og tí borgarliga búskaparliga politikkinum, ið hevur noytt fólk í milliónatali út í arbeiðsloysi.

Friður fyri øll

ST lýsti á sinni 70'ini sum altjóða avvápnaðarárini. Úrslitið varð tó tað øvugta. Hesi árini góvu í staðin heiminum nýggj, sterkari og óhugnaligari oyðingarvápn. Talið á kjarnorkuleðingum í dag liggur væl oman fyri tey 60.000, t.v.s., at kjarnorkuveldini nú kunnu oyða jørðina 40 ferðir.

Kravið Norðurlond Kjarnorkufrí eisini umfatandi Føroyar, Ísland og Grønland fær størri og størri undirtøku av norrønu fólkunum. Hetta krav er eitt tað fyrsta stigið í kjarnorkuavvápnaðinum umfatandi eisini onnur øki í Europa.

Tað ber ikki til longur at sita hendur í favn og bert bíða, meðan dubbingarørskapurin hjá stórveldunum førir okkum nærri undirgongd jarðar, ragnaroki.

Kravið um frið og avvápna er ikki bert at hoyra í norrønu londunum, men um allan heim, í Eystureuropa og Sovjetsamveldinum eisini, sjálvt um leiðararnir har royna at køva allar rørslur, ið ikki beinleiðis lýða boðini frá myndugleikunum. Í USA sleppa Reagan og hansara krigsgreðingar heldur ikki undan eini virknari friðarrørslu.

Tiltøk at fáa friðarrørslu at virka eisini í Føroyum eiga at verða stuðlað.

Arbeiði til allar hendur

Í Føroyum eru okur nú aftur farin at merkja fylgjurnar av teim støðugt aftur-vendandi kapitalistisku búskaparkreppunum. Eina harðast merkist hetta hjá ungdóminum, ið á henda hátt merkir, at ikki er brúk fyri honum, og vandi er fyri at samfelagið fær eitt heilt ættarlið av taparum. Kvinnurnar merkja eisini væl, at krepputíðir eru, nú er ikki longur brúk fyri teirra arbeiðskraft sum í búskaparligum góðum tíðum. Galdandi er, at størri og størri partar av okra fólki merkir fylgjurnar av búskaparligu niðurgangstíðunum og so harafturat tann manglandi viljan í hesum borgarligu alternativtíðum yvirhøvur at fremja arbeiðsfremjandi tiltøk.

Altjóða rættvísi

1. mai er altjóða arbeiðarsolidaritetsdagur, tí er tað ein sjálvsagdur lutur, at nevnt verður, hvussu fólk ymsastaðni berjast fyri frælsi og rættvísi, í móti kúgan og fátækradømi.

2/3 av heimsins íbúgvum liða hungur og hall. Hvønn dag doyggja 80.000 børn orsakað av skeivari og ov litlari føði. Í mun til tey livir tann eini triðingurin, sum okur eru ein partur av, í ørandi yvirflóð.

Nú fyri stuttum var eitt uppskot um menningarhjálp fyri í løgtinginum, men eisini hesaferð vísti borgarliga alternativið sítt sanna andlit at nøra um seg sjálvan og hini um rest. — Neyvan er tað teim leiðandi innan borgarliga alternativið komið til hugs, at framtíðar politikkarir í 3. heiminum kanska skulu taka støðu til at veita okra eftirkomarum menningarhjálp. Hvørjar próvgrundir skulu teir nýta fyri at sannføra teirra fólk um, at teir eiga at veita menningarhjálp til Europa og Amerika.

Okra solidaritetur eigur at rokka øllum teim, sum dag og dagliga striðast fyri frælsi og rættvísi. Tað verið seg um talan er um El Salvador, Turkaland, Afghanistan ella Polen. Í hesum londum vísa stórveldini sítt verunliga kúganarlyndi við antin beinleiðis ella óbeinleiðis luttøku í at halda fólkaviljanum niðri.

El Salvador

Frælsisstriðið í El Salvador er eingin ætlan um kommunistiska yvirtøku, sum heykarnir í Washington royna at billa fólki inn, men eitt ynski um rættvísi og demokrati. Í frælsisstriðnum luttaka politiskir bólkar líka frá langt til vinstru og yvir um miðjuna. Tað sum skuldi eitast at vera eitt demokratiskt val, var bert eitt val í millum høgrasektir, har vóru ikki aðrir møguleikar.

Polen

13. desember í fjør var ein vónbrotisdagur fyri teir